TILTØK

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 heldur møtirøðin áfram við evninum »Frá ótta og stúran til trúgv og gleði«.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11,
kl. 12.15 sunnudagsskúli,
kl. 18 evangeliskt møti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 19.30 undirvísing »Tey fyrstu stigini«, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Ólavur Jacobsen, Liquid Gravity luttekur við sangi og vitnisburði.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið í Havn
Fríggjakvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Alfred Hansen, barnaansing er møtan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið – Grýturættur, kl. 20 venur Manskórið.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Skúlin á Hvítanesi
Missiónsvikan byrjar fríggjakvøldið kl. 20.00, Sverri Steinhólm, prestur, talar.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnu-dagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Sunnivu og Hans Jacob Poulsen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Johannu Gaard Joensen, Vallalíð 1. Øll eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Vegna grækarismessuhaldið er sunnudagsskúlin avlýstur. Víst verður til familjugudstænastuna kl. 11, har øll eru vælkomin. Møguleiki er at hoyra talur frá møtum á heimasíðu okkara: www.koma.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, major Tjåland talar.
Mánadagin kl. 17 Skótar.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bøn, hoyri Jesus, kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

»Tíð til Gud«
verður úti í Pállstovu sunnukvøldið kl. 21.
Dánjal Petersen talar.
Dánjal av Rana og Jógvan Skúlindal skipa fyri.

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið 12. mars kl. 20.

Filadelfia, Sundalagi
Sunnudagin kl. 18 kvøldmøti. Mikudagin frá kl. 19 til 21 Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.

Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 greiða Mejnhardt og Judith Hansen, av Nesi, frá ferð í Ísrael, ljósmyndir verða sýndar. Drekka aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Ungdómslegan byrjar fríggjakvøldið kl. 20. Einki opið hús leygarkvøldið vegna ungdómslegu.
Sunnudagin kl. 17 møti við teimum ungu. Tú ert vælkomin í Kelduna.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará. Húsmøti verður týsdagin kl. 19 hjá Jonnu og Palla Højgaard, Saltangará. Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður ungdómsmøti við Vagn Foldbo.
Sunnukvøldið kl. 18 verður blákrossmøti, m.a. greiðir misnýtari frá lívi sínum. Øll eru vælkomin.

Lívsins Orð
Barnamøti verður leygardagin kl. 17.30 og opið hús kl. 20.30.
Sunnudagin kl. 17 verður møti.

Soli Deo Gloria
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 22 opið hús.
Sunnudagin 11. kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 16.30 ALPHA skeið (11-15 ár) kl. 18.00 møti við luttøku úr Rhema. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Missiónsvikan heldur fram í kvøld við møti kl. 20 Regin Høgnesen, trúboðari talar. Ymiskar sangkreftir luttaka.
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Regin Høgnesen, Magda og Majken syngja.
Sunnudagin verður familjumøti kl. 15, kl. 18 møti við Regin Høgnesen.
Ymiskar sangkreftir luttka.
Sunnukvøldið verður innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11, breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin 12. kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin 13. kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin 14. kl. 20 uppbyggingarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við major Knut Gamst.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

Føroysk møti
Føroyskt møti verður í **Svendborg** missiónshúsið (Dronningholmsvej 61) fríggjakvøldið 9. mars kl. 19.30 við Hera Elttør, kaffi verður aftaná møti.
Odense: Føroyskt møti í føroyingahúsinum »Miðgarði« (Rugårdsvej 23 kld.) sunnudagin 11. kl. 16 við Hera Elttør, kaffi verður aftaná møti.
13. mars í Missiónshúsinum í Handbjerk kl. 19.30.
14. mars í Missiónshúsinum í Hodsager kl. 19.30. Øll hjartaliga vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 12.3.
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmeld. til døgurðan og túrin mikudagin tlf. 316491
Týsdagin 6.3.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
Mikudagin 7.3.
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 15 Túrur út á Tinganes. Frásøgufólk Gudrun Haustein og Maiken Poulsen
Hósdagin 8.3.
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd
Fríggjadagin 9.3.
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríð, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni á Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Javni N. Finsensgøta 32
Skrivstovan er á Hoydalsveg 40, 3. hædd (ovast).
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl. 10-14
Fríggjadag kl. 13-16
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail:
javni@post.olivant.fo

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail:
sara@post.olivant.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

70 ÁR

Mánadagin 12. mars verður Jógvan Thomassen, Viðareiði, 70 ár. Hann er burturstaddur.

80 ÁR

Leygardagin 10. mars fyllir Daniel Jacob Smith Jensen, Tvøroyri, 80 ár. Hann er hitta heima millum kl. 11 og 13.

FILMSTEIGURIN

Almost Famous

Hann er ungur og aftan pallin undir ein rokkkonsert, innboðin av innarakredsinum av tí orkestrinum, hann er hugtikin av. Tað hevði verið ein feit uppliving fyri einhvønn tannáring, men tað er tað serliga fyri ein, hvørs ambitiónir og idéalir eru vorðin formað av tíðarinnar tónleiki. Tað hendir fyri William Wyler, sum er høvuðspersónurin í Golden Globe vinnandi »Almost Famous«.

Tá áhugin hjá Williami fyri tónleikinum tryggar honum eina uppgávur fyri Rolling Stone, sum vil hava hann at skriva um tann lovandi bólkin, Stillwater – sum er undir leiðslu av gittaristinum Russel Hammond (Billy Crudop), og forsangaranum Jeff Bebe (Jason Lee) – fer hann á eina læruríka turné við bólkinum, hóast mótmæli frá yvirverjandi mammuni (Frances McDormand). Tann vakra »Band Aid«

(ein bólkur av gentum, sum pástanda, at tær IKKI eru groupies) Penny Lane (Kate Hudson, dóttir Goldie Hawn) hjálpa Williami at koma inn í innarakredsin í Stillwater. Men tá tann ungi journalisturin fer frá at vera eygleiðari til at vera luttakari í dynamikkinum í bólkinum, verður tað truplari fyri hann at skriva objektivt um teir. Og hann lærir nakað týdningarmikið um týdning familjunnar – bæði fyri tað familju, vit verða fødd í, og hana, vit sjálv skapa…

Lúrandi tigarin, fjaldi drekilin

Crouching Tiger, Hidden Dragon

Crouching Tiger, Hidden Dragon eitur nýggi filmurin, sum er um kærleika, æru og svik.

Kina, stutt fyri at kinverka dynastiið gekk til grundar (Quing 1644-1911). Ránsmannabólkar her vesturi í landinum, og lívið á fastlandinum er merkt av opportunismu, samsvørjingum og fløktum politiskum spæli. Teir promonentu guvernørarnir og embætismenninir hava allir sín persónliga her, kallaður Wuxiarar, eitt slag av Samuraium, sum ofta eru serfrøðingar í onkrum serligum stríðsítrótti.

Li Mu Bai (Chow Yun Fat) verður hildin at vera ein av frægastu hermonnunum í síni tíð. hann er á veg til Peking at lata svørið, tað legendariska Green Destiny, til tann høgt virda Hr. Te (Lung Sihung). Li Mu Bai hevur, eftir fleiri ára drúgva tænastu, gjørt av at royna nýggjar leiðir. *A gev til Peking hittir hann vinkonuna Shu Lien (Michelle Yeoh). Bæði

hava tey tað trupult við at fjala kenslurnar fyri hvørjum øðrum. Shu Lien er eisini á veg til peking, og Li MU bai fær hana at lata svørið fyri seg.

Men svørið verður stolið hjá Hr. Te. Shu Lien jagstrar tjóvin, men viðkomandi hvørvur um náttina. Óvitandi um hvørvanina kemur Li Mu Bai og verður fløktur upp í jagstranina eftir gløgga tjóvinum.

Í sambandi við jagstranina møtir Shu Lien dóttur Yus guvernør (Li Fa Zeng), Jen (Zang Ziyi). Jen er ósek genta, sum er eitt sindur ótrygg yvur fyri komandi brúdleypinum. Men samstundis er hon hugtikin av lívinum sum hermaður. Shu Lien er sannførd um, at jen er innblandað í stuldurin. Spakuliga avslørar hon Jen, men lovar, at um Gren Destiny verður latið aftur, hendir ikki meira í sakini. Jen er vorðin hugtikin av Shu Lien, og ikki minst í óforloysta kærleikanum millum hana og Li Mu Bai. jen er sjálv offur fyri kúgaðum kærleika til bandaleiðaran Lo (Chang Chen). Li Mu Bai og Shu Lien gera av at hjálpa við at sameina unga parið...

OSCAR NOMINERINGER

♥♥♥♥♥
"Almost Famous er en af de bedste film nogensinde om rockmusikkens attraktion" Kim Skotte, Politiken
★★★★★
"En enestående film" Go' morgen DK/TV2, Niels Frid
"Cameron Crowe har skabt en velskrevet, vittig, varm og vindende film om ungdomsdrømme og rockmusik" Niels Lind Larsen, Aktuelt
"Almost Famous er allerede favorit i Oscar næset. Det er mere end fortjent, for Cameron Crowe har lavet sin hidtil bedste film" Henrik List, Berlingske Tidende
★★★★ Ekstra Bladet ★★★★ BT
"En lille juvel af film der lever og ånder i næsten hver scene" Bo Green Jensen, Weekend avisen
"En helt igennem velfortalt, skæg, velspillet og uanstrengt forløst komedie" Klaus Lynggaard, Information

Frumsýning
Fríggjadagin 09.03. kl. 23[00] Leygardagin 10.03. kl. 23[00]
Sunnudagin 11.03. kl. 22[15]

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.
www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 311956 ☆

10 OSCAR NOMINERINGER

"FREMRAGENDE."
"Giver historisk indblik og underholder stort... effektfuld og smuk." Aktuelt, Niels Lind Larsen
"Ubeskrivelig smuk film med lige dele fantasifuld kamp og sprudlende kærlighed." ★★★★★ B.T., Ronald Lindvist
"Enestående flot, dramatisk og gribende biografoplevelse." ★★★★★ Ekstra Bladet, Janne Gade
"En fremragende film, der tager det bedste fra to verdener og skaber magi i mødet mellem dem... slår benene væk under publikum." Information, Christian Monggaard Christensen
"Underholdende og klog, fyldt med gedigen action og stort menneskekundskab" ★★★★★ Jyllands-Posten, Per Calum

Frumsýning
Fríggjadagin 09.03. kl. 20[30] Leygardagin 10.03. kl. 20[30]
Sunnudagin 11.03. kl. 19[45]

Fríggjadagin 09.03. kl. 18[45] Fríggjadagin 09.03. kl. 21[00]
Leygardagin 10.03. kl. 18[45] Leygardagin 10.03. kl. 21[00]
Sunnudagin 11.03. kl. 22[30]

Fríggjadagin 09.03. kl. 18[00] Leygardagin 10.03. kl. 18[00]
Sunnudagin 11.03. kl. 17[30]

Fríggjadagin 09.03.kl. 23[15]
Leygardagin 10.03.kl. 23[15]
Sunnudagin 11.03.kl. 19[30]

KOMANDI FILMUR



Frumsýning
Fríggjadagin 16.03.